UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Eiðis Kommuna
Brekkuvegur 37
470 Eiði
Føroyar

Tórshavn, tann 10. juni 2021
J.nr.: 20/02927-7
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

*Góðkenningarskriv*

**Broytingar í byggisamtyktini fyri Eiðis kommunu fyri Svínáir og Ljósá**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Djóni Thomasen, adv. vegna Eiðis kommunu í skrivi, dagfest 27. oktober 2020, sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Eiðis kommunu til góðkenningar.

Málið er framhald av broytingunum í byggisamtyktini fyri Eiðis kommunu, sum vóru góðkendar tann 15. oktober 2020.

Talan er um broytingar fyri Svínáir og Ljósá

**Svínáir**: partur av ognini matr. nr. 402 verður broyttur frá G-neyst og bátapláss til GB- neyst við bústaðarmøguleika og ognirnar matr. nr. 196 og 280d verða broyttar frá K- summarhúsøki til B-sethús/bústaðarøki.

**Ljósá:** matr. nr. 83b verður broyttur frá H-frílendi til B-sethús/bústaðarøki.

Broytingarnar hava ligið frammi frá 27. oktober 2020 til 17. november 2020. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum, dagfest 24. mars 2021, til at góðkenna broytingarnar fyri Svínáir og Ljósá, sum omanfyrinevnt.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, at byggisamtyktin fyri Eiðis kommunu fyri Svínáir og Ljósá, verður broytt sum omanfyrinevnt.

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Eiðis kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega

møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt rættað kortskjal við átekning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Kristvør Hentze Poulsen